## Paula Larrain stillar upp

SV-journalisturin Paula Larrain váttar nú fyri donskum fjølmiðlum, at hon stillar upp til fólkatingsvalið komandi. Kendi sjónvarpsverturin stillar upp fyri konservativa flokkin í Stórkeypmanahavn, har hon skal loysa Stig Elling av, sum heldur óvæntað boðaði frá, at hann stillar ikki uppaftur. Donsku bløðini hava annars gitt dúgliga, at Paula skal hava bjóða seg fram sum valevni hjá Naser Khader og Ny Alliance, men hetta avsannar hon kortini.



## Burturflutt genta funnin

Keldur í spanska detektivbureau'num Metodo 3, sum foreldrini hjá burturfluttu Madelaine McCann hava fingið at leita eftir dóttir teirra, siga við bretska blaðið Daily Express, at teir hava funnið eina ljóshærda amerikanska gentu í økinum, har teir leita eftir Madelaine. Interpol er komið upp í málið, og hendingin hevur givið Kate og Gerry McCann nýggjar vónir um, at lítla Madelaine eisini verður funnin á lívi.

# 266b-spurningurin á pall

**Drápið av einum ungum samkyntum amerikanara í lítla býnum Laramie í Wyoming, USA, hevur ført við sær ein doku-drama leik, og amerikanska senatið hevur í ár samtykt eina lóg, sum nú umfatar samkynt og brekað í minnilutaverju**



*Hjálmar Dam, sitandi fremst, Birita Mohr, Gunvá Zachariassen, Egi Dam og Marita Dalsgaard eru leikararnir í leikinum Verkætlan Laramie*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SJÓNLEIKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fyri níggju árum síðani var hin 21 ára gamli Matthew Shephard bukaður so illa, at hann doyði av løstunum. Matthew var samkyntur, og tað var eftir øllum at døma einasta orsøkin til, at tveir ungir menn sóu seg illar inn á hann.

Hendingin skakaði alt USA og varð umrødd í øllum teimum stóru miðlunum. Hetta førdi eisini til eitt landsumfatandi kjak um hatursbrotsgerðir.

Íbúgvarnir í Laramie vórðu eisini skelkaðir av hendingini og fingu seg illa at trúgva, at slíkt kundi henda í teirra lítla býi. Flestu hildu eisini í fyrstu atløgu, at tað mátti vera onkur fremmandur, ið hevði framt brotsgerðina.

Tann veruleiki, at offurið var ein samkyntur, setur fokus á evnið. Fólk í Laramie eru á einum máli um, at tað sjálvsagt er skeivt og ræðuligt at fremja eina slíka brotsgerð. Men hetta hevur eisini ført til, at fólk í býnum hava eina støðu til tað, at vera samkyntur. Tey hava eina meining um, hvørt hetta er rætt ella skeivt, men av tí at kristindómur spælir ein stóran leiklut í Laramie, er hetta fyri mong ein trúðarspurningur.

Fyrsta doku-drama

At brotsmenninir ikki vóru fremmandir, men tveir av teirra egnu, førdi til, at íbúgvarnir seta spurnartekin við tað umhvørvi, ið teirra børn vaksa upp í.

Katólski presturin í býnum heldur, at tey eiga at nýta hendingina til nakað konstruktivt – at lata brotsmenninar siga teirra søgu, so tey kunna læra av teimum, hvat ið tað var sum gjørdi, at teir hesa náttina fóru út um alt mark.

Sum leikurin fer sodnar hendan ræðuliga hendingin hjá fólki. Hvør í sínum lagi hevur sína hugsan um hendingina, og við leiklok eru íbúgvarnir vorðnir nøkur onnur menniskju, enn tá leikurin byrjaði.

Leikurin kom í lag við tað, at stutt eftir hendingina fór The Tectonic Theater Company undir leiðslu av Moisés Kaufmann til Laramie, har leikararnir gjørdu samrøður við fólk í býnum. Tey vitjaðu javnan aftur í tvey ár og gjørdu fleiri enn 200 samrøður tilsamans.

Sjónleikurin Verkætlan Laramie byggir á hesar samrøðurnar. Av tí at alt tilfarið í leikinum eru skjalfestar heimildir og ikki fiktión, er leikurin eitt doku-drama. Hetta er samstundis fyrsta doku-drama, sum verður framført í Føroyum.

### Matthew Shephard Act

Hendingin í Laramie skakaði ikki bert lokalsamfelagið, men sendi rembingar um alt USA. Í september í ár, níggju ár eftir drápið, samtykti amerikanska senatið, at samkynt og brekað eisini verða fevnd av lógini um verju móti hatursbrotsgerðum. Lógarbroytingin er uppkallað eftir hesi hendingini og verður á mannamunni nevnd The Matthew Shephard Act.

Marita Dalsgaard, sum er leiðari av verkætlanini, hevur sjálv týtt leikin. Hon er búsitandi í Danmark, men er her heima í sambandi við leikin, sum verður frumsýndur 25. november.

Við í leikinum eru upprunaliga heilir 54 leiklutir, men leikararnir eru vanliga einir átta. Í føroysku útgávuni eru fimm leikarar og teir eru Egi Dam og Birita Mohr, Gunvá Zachariassen úr leikbólkinum Tvazz, Hjálmar Dam og Marita Dalsgaard. Leiklutirnir eru eisini heldur færri, einir 45.

Eitt kuriosium við leikinum er, at hann verður framførdur í Müllers Pakkhúsi, og hetta er fyrstu ferð ein leikur verður framførdur har.

## Sambandið klárt til valið

**Sambandsflokkurin er liðugur við valevnislistan til komandi fólkatingsval. Valevnini eru 22 í tali og eru tey hesi skrivað í bókstavarøð:**

Helgi Abrahamsen, floksskrivari, Strendur
Svenning Borg, sjómaður, Vágur
Annfinn Brekkstein, stjóri, Velbastaður
Johan Dahl, løgtingsmaður, Vágur
Marjus Dam, løgtingsmaður, Miðvágur
Erikka Elttør, krambakvinna, Klaksvík
Olav Enomoto, løgtingsmaður, Vestmanna
Edva Jacobsen, bankakvinna, Fuglafjørður
Eivind Jacobsen, brandmeistari, Sørvágur
John Kári Jacobsen, skipari, Hvannasund
Edmund Joensen, løgtingsmaður, Oyrarbakki
Kaj Leo Johannesen, løgtingsmaður, Tórshavn
Bjørn Kalsø, landsstýrismaður, Klaksvík
Magni Laksáfoss, landsstýrismaður, Streymnes
Høgni Mikkelsen, býráðslimur, Tórshavn
Gunnar K. Nattestad, bankamaður, Sandavágur
Ingvør Nolsøe, stjóri, Tórshavn
Alfred Olsen, løgtingsmaður, Saltnes
Marjun Olsen, sjúkrahjálpari, Øravíkarlíð
Rósa Samuelsen, borgarstjóri, Sandavágur
Bjarti Thomsen, granskari, Nólsoy
Jaspur Vang, løgreglumaður, Tvøroyri

Valskráin hjá Sambandsflokkinum er klár, og verður løgd fram á tíðindafundi hósmorgunin, sigur Sambandsflokkurin í skrivi.